



*Høgni Johansen var og royndarkoyrdi ATV-irnar hendan dagin, myndamaður okkara var framvið*



*Áhugin í Vestmanna er ógvuliga stórur fyri túrunum, sum teir báðir brøðurnir fara at skipa fyri. Her roynir Jákup Follend seg*

á Mýrarnar, tann vegin niðan, har vindmyllurnar standa. Hin er meiri at rokna til teirra, sum eru vanari við at koyra á slíkum motorsúklum, og tann rutan liggur niðan á eitt fjall, Loysningsfjall nevnt, sigur Johnny Joensen.

Roknað verður við at léttara rutan fer at taka áleið ein til hálvanannan tíma, meðan tann tyngra varar um tveir tímar.

Johnny sigur víðari, at tað hevur víst seg, at hesar motorsúklurnar ikki órógva í haganum.

– Seyðurin hevur longu vant seg við motorsúkurnar og verður liggjandi, tá koyrt verður framvið. Hinvegin fer seyðurin undan, tá fólk koma til gongu, greiðir Johnny Joensen frá.

### Ávirkar ikki hagan

So Johnny hevur staðfest, at motorsúklurnar spekja heldur enn styggja seyðin, men hvussu so við haganum sjálvum?

– Nei, har sæst eingin farvegur eftir hjólunum, so tað merkir ikki hagan á nakran hátt. Hartil sigur tað seg næstan sjálvt, at hesar útferðirnar bert verða gjørdar, tá líkindi eru til tess – tað vil siga, tá hagin er turrur, sigur Johnny Joensen.

Tað hevur sjálvandi verið eitt sindur trupult at kanna marknaðin fyri slíkum útferðum á motorsúklu í haganum, men í Vestmanna sjálvum er stórur áhugi.

– Tað hava vit í hvussu er fingið staðfest. Vit hava eisini gjørt nakrar túrar longu, meiri soleiðis á royndarstøði, og tað vísir seg, at fólk eru rættiliga spent at sleppa við. So sjálvandi vóna og rokna vit við, at sami áhugi verður aðrastaðni frá, eisini frá útlendskum ferðafólki, sigur Johnny.

Vestmanna hevur jú framman undan eitt av størstu ferðafólkamálum í landinum, nevniliga túrarnar undir Vestmannabjørgunum. Nú fer so at bera til at uppliva bjørg í Vestmanna á annan hátt.

– Tað er klárt, at talan er um eina rímiliga stóra íløgu. Vit hava eisini keypt neyuga trygdarútgerð so sum draktir, handskar og hjálmar. Hartil eru vit greiðir yvir, at talan verður um nógv viðlíkahald, men eg ivist ikki í, at fólk fara at taka væl undir við hesum tilboðnum at uppliva náttúru og haga á ein »bekvemman« og spennandi hátt, sigur Johnny Joensen.

# Urðardansur í Kvívík

**Leygardagin skipar Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag og bygdarfelagið Glæman fyri árliga dansinum við bátahylin í Kvívík**

Ja, nú verður hann so!

Hvør?

Jú, tann vælumtókti urðardansurin verður við bátahylin í Kvívík leygardagin 25. august, sum KSR og Bygdarfelagið Glæman skipa fyri. Soleiðis hevur staðið í bløðunum eina tíð, og nú verður tiltakið so komandi leygardag.

Byrjað verður klokkan15 við tombola við 200 vinningum og fiskibrunni, hoppiborg, og barnaróður verður um viðrar. Hartil verður sjálvandi eisini okkurt etandi, so sum grønar pannukøkur við litaðum róma, kaffi og ísi. Og einki slíkt tiltak uttan eisini ein pylsuvogn.

Byrjað verður við dansinum klokkan 18, og tað verða børnini, sum leggja fyri.

Frá klokkan 21 verður møguleiki at keypa sær ein góðan, grillaðan kjøtbúff við salati, og hann verður etin saman við harmonikutónleiki frá vælumtóktu harmonikutónleikarunum úr Kvívík. Teir hita upp til veruliga dansin, sum verður við LM-band og byrjar klokkan 22. Til dansin verður 14-ára aldursmark.

Verður veðrið til vildar, koma motorsúklur frá MC-felagnum til Kvívíkar klokkan 16.

Trygdin verður í lagi, tí samarittar frá Reyða Krossi verða á staðnum. Fyrireikararnir vóna, at nógv fólk nýta høvið at hava eitt gott kvøld og nátt í Kvívík.



*Kvívíkingar gera nógv burtur úr urðardansinum í bygdini*

*Savnsmynd*